# ad and the ugly

*Mítt Asfalt: Arni Zachariassen er 23 ára gamal. Hann er í tónleikahøpi best kendur sum gittarleikari í Braquet og Iam. Til ber at vitja Arna á myspace profili hansara: myspace.com/arnizach*














*Fólk var komið saman at hugnað sær á Asfalt, men musikkskúlalærarar n‡ttu høvið at vísa sína ónøgd við sína støðu.*

*mynd: Jens Kr. Vang*

so vítt, eg dugdi at síggja, gjørdi hesi øll eitt gott arbeiði. Men við eftirliti meini eg við eftirlit við pallarnar sjálvar. Tá ið Petur Pólson endaði sína konsert á Tjóðpallinum við einum friðar- og inniligum lagi, sum, fyri mítt viðkomandi, lyfti konsertina á eitt veruliga høgt og vakurt støði, var friðurin knappliga órógvaður av einum fullum dreingi, sum fleiri ferðir rópti hart eftir Peturi og sum ikki tagnaði og fór út, fyrrenn hansara líka fulli, men eitt sindur betri skikkaði, vinmaður háláði hann út (einamest tí konsertin var, sambært teimum, "rodin"). Um ordiligt eftirlit var á staðnum, slapp hesin dreingurin ongantíð inn og konsertin kundi hildið á, órógvað. Ein líknandi hending, sum var uppaftur meira pínufull, hendi tá ið Gulli Johansen, undir heitinum Nanoscopic, spældi á Margarinfabrikkini. Ímillum tveir sangir fór ein drongur uppá pallin til Gulla og byrjaði at róta ímillum streymleidningarnar hjá honum, við tí úrsliti at digitala útgerðin hjá Gulla sløknaði. Drongurin rýmdi so eftir hetta, og vit sótu øll pinnastill í eina góða løtu og bíðaðu eftir, at teldan hjá Gulla skuldi tendra aftur – tað vardi nokk bara var 5 minuttir, men tað føldist sum ein tími. Slíkt kloddarí má ikki henda og var veruligt eftirlit við allar pallarnar, so hevði tað heldur ikki hent.

Annars helt eg tað vera eitt sindur løgið, at ikki so mikið sum ein pylsuvognur var á festivaløkinum. Eg haldi meg hava hoyrt, at Asfalt ikki vil stjala kundar frá handlum í miðbýnum, men tað kann ikki vera rætt, at festivalgestirnir noyðast at ganga allan vegin niðan í Steinatún, bara at keypa eina Jolly.

Umframt hetta, so haldi eg eisini, at tað skal lógarfestast at oyraproppar skulu verði býttir út til allar konsertir og øll tiltøk, har larmurin fer uppum eitt ráðiligt desibellmark. Øll skuldu fingið einar útflýggjaðar, tá ið tey fingu armbond og allar vaktir skuldu havt fullar lummar.

## Tað ræðuliga

Til seinast vil eg siga eitt sindur um tað ræðuliga. Hetta hevur einki beinleiðis við Asfalt at gera, men er heldur tónleikaumstøðurnar í Havn. Asfalt verður og varð av fyrstan tíð gjørt fyri at betra um umstøðurnar hjá tónleikinum í Føroyum, serliga í Havn. Sum øllum kunnugt er einki stað, ið burturav er spælistað í Havn. Norðurlandahúsið er for stórt, Kaggin og Margarinfabrikkin eru for lítil. Tónleikarar í øllum Føroyum hava brúk fyri einum spælistaðið, sum kanska kundi mint eitt sindur um Mentanarhúsið í Fuglafirði (ella kanska slett ikki), har umstøðurnar eru serliga veittar til tónleikin og tónleikin eina. Tað er gott, at Asfalt setur ljóskastaran á hendan ómetaliga stóra trupulleika – sjálvt um talan kanska er meira um eina lummalykt enn ein ljóskastara. Í fjør fór yvirskotið frá festivalinum í ein grunn, sum skuldi (partvíst?) fíggja eitt spælistað. Hetta yvirskot man ikki hava verið serliga stórt, tí í ár er onnur, longu partvíst útgreinað, leið stungin út í kortið. Føroya Banki hevur, sum høvðusstuðul, lovað at latað 3000 krónur í Asfalts-grunnin fyri hvønn bólk, ið spældi á ársins festivali. Umleið 50 bólkar spældu í ár og 50 ferðir 3000 er 150.000. Hetta er fragari enn einki og, sum man tekur til á enskum, so kunnu biddarar ikki vera kræsnir, men for hundin! 150.000 er einki! Í Havn fært tú kanska grundstykki til ein pylsuvogn fyri 150.000. Serliga í miðbýnum. Men hetta er tíverri als ikki størsti trupulleikin. Føroya Banki hevur rós og tøkk uppiborið fyri teirra stuðul – veruligi trupulleikin, elefanturin í rúminum, tað, sum øll síggja, men eingin sigur, at trupulleikan við einum spælistaðið átti Tórshavnar kommuna longu langt síðan at havt loyst. Jú, gamaní, kommunan stuðlar eins og Føroya Banki Asfalt, men eg sakni eina veruliga loysn á hølistrupulleikanum. Tórhavnar kommuna hevur í nógv ár hildið tónleikin fullkomiliga fyri gjøldur. Raðfestingin hjá Tórshavnar kommunu av tónleikinum hevur og er, fyri at siga tað pent, bæði katastrofal og frek, serliga samanborin við ítróttin, og sum úrslit er ein grundleggjandi partur av trivnaðinum hjá einum stórum parti av borgarunum í Havn fullkomiliga ignoreraður og burturtagdur. Hetta er av sonnum ræðuligt – ræðuliga vánaligt og ræðuliga ørkymlandi. Sum eitt tiltak, ið vísir fram tað spennandi, livandi og framúr feita, ið liggur og fýsir undir tónlistarliga lokinum, skuldi Asfalt, um rættvísi er til, víst politikarunum longur niðan gøtuni, at hesin manglandi vilji og yvirfloymandi illvilji er fullkomiliga og syndarliga absurd og í veruleikanum embætismisrøkt.

Ársins Asfalt spældi, í mínari meining, væl av. Sjálvt um strammað kundi verið upp í støðum, so er tiltakið sum heild gott, hugnaligt og, serliga, spennandi. Í teimum góðu, hugnaligu og spennandi løtunum varpaði Asfalt ljós á bæði tað góða og tað ringa í føroyskum tónlistarligum høpi – og tað ræðuliga í lokalpolitiskum høpi.